# MÚLA

Hvannasunds kommuna / *Municipality of Hvannasund*










Her ert tú
*You are here*

Gongugøta
*Walking path*

Neyð og hjálp
*Emergency call*
**112**

Visit Norðoy

Tel. +298 456939

Skanna hesa kotu, og kunna teg nærri um ferðamøguleikar í Norðoyggjum.

*Scan this code, and get more information about travelling in the Northern Islands.*

## FO

Seinastu fólkini fluttu úr Múla í 1992, men ferðafólk og røktingarmenn vitja tíðum fjarskotnu bygdina, har Guttormur í Múla, sum var ramur í gandi, einaferð búleikaðist.

### Søga

Múla er fyrstu ferð nevnd í Hundabrævinum frá á leið 1350 og er ímillum eldru bygdirnar í Føroyum. Fólkatalið í Múla lá um 10-25 fólk frá fyrst í 1800-talinum fram til 1980-ini. Bygdin hevði ferðalærara, og upp í 10 skúlabørn hava verið í Múla samstundis. Bygdafólkið hevur livað av landbúnaði og útróðri. Múla varð sum seinasta bygdin í Føroyum bundin í elkervið í 1970. Bygdin var eisini ein av seinastu bygdunum at fáa vegasamband, tá vegurin varð íbundin í 1988. Fyri tað varð annaðhvørt gingið úr Norðdepli ella av Skálatoftum um Múlan. Postsambandið varð røkt við Immanuel frá 1916 til 1959, tá ið Másin tók við. Seinni hava Barðskor og onnur røkt leiðina, til vegurin kom.

### Múla í dag

Múla er partur av Hvannasunds kommunu, og tað eru 4 hús í bygdini: Har Inni (1), festihúsið er frá fyri 1800. Verandi hús varð bygt sum tvíhús í 1930, og norðari parturin kallast Har Suðuri (2). Har Norð (3) er upprunaliga frá fyri 1800, men verandi hús er bygt í 1915. Har Uppi (4) varð bygt í 1830-unum, men verandi hús varð bygt í 1912. Einki fólk býr fast í Múla longur, men kortini eru ofta fólk í bygdini. Um veturin koma fólk mest at røkta seyðin, men um summarið leita nógv ferðafólk til Múla. Hagin í Múla er 10 merkur, av hesum eru 2 ½ merkur landsjørð, restin er ogn. Tað eru 281 áseyðir. Fuglalívið er ríkt: tjaldur, mýrisnípa, terna, spógvi, lógv, mortítlingur, kjógvi, havhestur, stari og skúgvur.

### Húsini har Frammi

Húsini har Frammi í Múla (5) vórðu tikin niður í 1961 og flutt til Frilandsmuseet í Sorgenfri í Danmark. Tað vóru hjúnini Joen Frederik Olsen (f. 1870) og Else Olsen (f. Frederiksen), sum áttu húsini. Tað var danski professarin Bjarne Stoklund, sum stóð fyri arbeiðnum at taka húsini niður.

### Guttormur í Múla

Guttormur Rasmusson (1657-1737), kallaður Guttormur í Múla, var bóndi í Múla. Søgnin sigur, at hann var tiltikin stinnur í gandi. Guttormur var sonur Rasmus Magnusson í Haraldssundi, navnið á mammuni er ikki at finna. Foreldrini doyðu, áðrenn hann var tilkomin. Guttormur fór allarhelst norður til Múla at búgva hjá skyldfólki. Eisini sigast Hanus í Gerðum, bóndi, og konan, Anna Berintsdóttir, ið var slektað frá Fynbo presti, at hava tikið sær av Guttormi. Hetta vóru múgvandi, høgt mentað og bókakøn fólk, ið Guttormur hevði tilknýti til. Á lívsleið Guttorms hendi mangt. Hann varð boðin at fara niður upp á landsins besta, men fór ikki vegna forfall, varð meldaður av konu síni á vártingi fyri at hava verið við aðrari kvinnu, hjálpti presti við sálarligum trupulleika og bjargaði viðingum úr Drangi norðantil á Viðoynni. Guttormur var giftur við Billu, og tey bæði fingu átta børn saman, tríggjar dreingir og fimm gentur. Guttormur í Múla er grivin í kirkjugarðinum á Viðareiði.

### Rættin hjá Múla Andrass

Múla Andrass, sum livdi áðrenn Guttorm í Múla, gjørdi rættina (6), og tískil er hon gjørd áðrenn 1650. Rættin er framvegis sjónlig, men hon kann vera torfør at finna, tí tað sjáldsama við henni er, at hon mestsum er grivin niður í bøin. Fylg uppteknaðu leiðini fram við áarbakkanum, um tú vilt síggja hesa forvitnisligu fortíðarleivd.

## EN

*The village of Múla has been abandoned since 1992, but travellers and shepherds, who tend to the sheep, frequently visit the remote village where the famous sorcerer Guttorm í Múla once lived.*

### History

*Múla is among the first settlements in the Faroe Islands. It is mentioned in the historical Hundabrævið (The Dog Letter) that dates back to 1350. Since the beginning of the 1800s and up to the 1980s, the population of Múla varied between 10 and 25 inhabitants. At one point there were ten pupils in the local school. Historically, the people of Múla lived on fishing and farming. Múla was hooked up to the national electricity grid in 1970, the final place in the Faroes to do so. In 1988, Múla was one of the last villages in the Faroes to become accessible by road. Before this, the village was only reachable on foot from Norðdepil, by crossing the cape of Múla from Skálatoftir, or by boat.*

### Múla Today

*Múla is part of the municipality of Hvannasund, and there are four houses in the village. Har Inni (1) – the original farmhouse located here was built before the 1800s. The current house was built in 1930 as two semi-detached homes; the southern home is called Har Suðuri (2). The other houses are Har Norð (3) – originally from 1800 and rebuilt in 1915, and Har Uppi (4) – originally from 1830 and rebuilt in 1912. Although there are no permanent residents, people visit the village year-round. In the winter, hardly anyone but shepherds tending to their sheep pass through the village. But in the summertime, people come here for their vacation or visit the village for a few hours as part of their journey. Múla is rich in birdlife. Eurasian oystercatchers, snipes, arctic terns, whimbrels, European golden plovers, wrens, arctic skuas, northern fulmars, starlings and great skuas are among the birds that live in the area.*

### The House Har Frammi

*The house Har Frammi once stood in Múla, but was taken down in 1961 and moved to the open-air museum in Sorgenfri, Denmark. Joen Frederik Olsen, born in 1870 and his wife Else Olsen, born Frederiksen, owned the house. The Danish professor Bjarne Stoklund headed the relocation of the house (5).*

### The Sorcerer Guttormur í Múla

*Guttormur Rasmusson (1657-1737), known as Guttormur í Múla, was a farmer in Múla. Legend has it that he was a skilled sorcerer. Guttormur's father was Rasmus Magnusson of Haraldssund, but his mother's name is unknown. His parents died when he was young, and it is believed that he came to Múla to live with relatives. The farmer Hanus í Gerðum and his wife Anna Berintsdóttir, who was a descendant of the Vicar of Funen, Denmark, are said to have cared for Guttormur. They were wealthy, cultured and well-read people. Guttormur í Múla lived an eventful life. His wife laid a charge against him at the Spring Council of the Faroe Islands for having been with another woman. He is also said to have helped a priest with mental illness and to have rescued men from the island of Viðoy who got into trouble when they were stranded high on a rock on the north side of Viðoy. Guttormur í Múl was married to Billa, and they had eight children, three boys and five girls. Guttormur í Múla is buried in the churchyard in Viðareiði.*

### The Sheepfold of Múla Andrass

*Múla Andrass, who lived before Guttorm í Múla, built the sheepfold (6) sometime before 1650. The sheepfold is still visible, but it can be hard to find because, unlike most sheepfolds in the Faroes, it is sort of dug down into the field. Follow the marked path along the riverbed if you wish to see this fascinating ancient remain.*

### Ver ein hjálpirót

- Lat einki órudd liggja eftir tær – rudda heldur upp.
- Stuðla bygdunum – keyp staðbundnar vørur.

### Be a helping root

*Hjálpirót is the Faroese word for rose root (Rhodiola rosea), a flourishing plant traditionally used for medicine. Hjálpirót means „helping root", and you can be one by following these simple steps.*

- *Please do not litter – but feel free to pick up litter on your way.*
- *Support the local community – buy local goods.*

*

### Tá ið tú fert til fjals

- Best er at hava staðkendan ferðaleiðara við á túrum í fjøllunum – nærri kunning fæst á Norðoya Kunningarstovu.
- Boða onkrum frá, um tú fert til fjals uttan ferðaleiðara.
- Fylg rásum og varðum, og minst til at lata hagaportrini aftur eftir tær.
- Gev seyði, fugli og gróðuri frið.

### Hiking advice

- *We recommend that you bring a local guide with you on mountain hikes in the Northern Islands. Please contact Visit Norðoy for further information about guided hiking trips.*
- *If you do go on your own, please let your host know where you are going.*
- *Follow the paths and cairns, and close the outfield gates behind you.*
- *Avoid disturbing sheep, birds and plants.*

Nærri kunning um trygd á fjalltúrum fæst við at skanna hesa kotu.

*For more information about safe hiking in the Faroe Islands, please scan this code.*

## VIT VIÐMÆLA

### Gongutúrur Yvir á Gjótanga

Fylg hagagøtuni norður um Múla og uppliv stórsligna útsýnið Yviri á Gjótanga (7). Hetta er ein lættur túrur, ið tekur á leið 10-15 minuttir hvønn vegin. Set ferðina niður, tá ið tú kemur til rapaðu toftina av fleygingarhúsinum - haðan eru bara 50 metrar til gjáarmunnan. Nærkast gjónni varisliga og ímynda tær, hvussu leikur fór, tá ið fólk úr Múla plagdu at síga eftir havhestaeggum. Far tó ikki ov nær gjáarmunnanum, tí gjógvin gerst brádliga steyrrøtt og er tí vandamikil.

### Serlit atlit

- Tað er ikki ráðiligt at koyra við stórum akfari um brúnna, hon tolir tað ikki.
- Heitt verður á fólk um at ganga minst møguligt í bønum og at halda seg til sjónligu gøturnar niðan til bøgarðin.
- Hagin er brattur í Múla, so rátt verður frá, at ókunnufólk fara til gongu niðaná einsamøll og í ivaveðri.
- Best er at siga onkrum frá frammanundan, um farið verður langt niðan ella runt Múlan.

## LOCAL'S CHOICE

### Hike to Yviri á Gjótanga

Follow the mountain path to the north of Múla, and experience the magnificent view at Yviri á Gjótanga (7). This is an easy hike about 10-15 minutes each way. Slow down when you approach the caved-in ruin of the bird catchers' house - from here there are only 50 metres to the mouth of the gorge. Approach the gorge cautiously and try to imagine what it was like when people from Múla were lowered down the bird cliffs to collect eggs from the northern fulmar.

### Be aware

- Please park your car before crossing the bridge. It is inadvisable to drive a large vehicle across the bridge since the bridge is fragile and might collapse due to the pressure.
- We kindly ask visitors to walk on the paths – not on the grass.
- The area around Múla is steep and can be dangerous. It is not advisable for people who are unfamiliar with the surroundings to venture up into the surrounding countryside on their own or to hike in questionable weather.